betri trygging

# Rakstrartap
*av sjúku ella skaða*

Hendan kunningin veitir ikki allar upplýsingar um tryggingina móti rakstrartapi av sjúku ella skaða. Tá ið skaði er, eru tað fullfíggjaðu tryggingartreytirnar og tryggingarskjalið, sum eru galdandi. Tú finnur nýggjastu tryggingartreytirnar á heimasíðu okkara www.betri.fo. Tú ert eisini vælkomin at seta teg í samband við okkum á tel 348 600 og fáa nærri vegleiðing.

## Hvat slag av trygging er talan um?

Tryggingin fevnir um fíggjarligt tap, sum fyritøkan hevur, tá ið starvsfólk verða langtíðarsjúkraskrivað.

## Hvat fevnir tryggingin um?

Tryggingin dekkar rakstrarmissin, sum fyritøkan hevur, um eitt ella fleiri av starvsfólkunum koma út fyri vanlukku ella sjúku og harvið verða langtíðarsjúkraskrivað.
Tryggingin dekkar, tá ið tey starvsfólk, sum eru nevnd í tryggingarskjalinum, verða sjúkrameldað í langa tíð.

### Dekningar

Tryggingin kann geva endurgjald fyri:

- ✓ Lønarútreiðslur
- ✓ Rakstrartap
- ✓ Meirútreiðslur fyri at minka um rakstrartap, eitt nú í sambandi við avloysara
- ✓ Útreiðslur til grannskoðara

### Hvat dekkar hon ikki?

Her eru nøkur dømi um viðurskifti, sum tryggingin ikki fevnir um.

Legg til merkis, at listin ikki er fullfíggjaður. Fullfíggjað yvirlit sært tú í tryggingartreytunum.

- ✕ Sjúkrafráveran skal vara meir enn fýra vikur, áðrenn tryggingin kann geva endurgjald.
- ✕ Tryggingin gevur rætt til endurgjald aftaná 14. dag í sjúkratíðarskeiðnum.
- ✕ Tryggingin gevur í mesta lagi endurgjald í 50 vikur fyri hvønn sjúku- ella vanlukkutilburð.

### Eru avmarkingar í dekningum?

Her eru nøkur dømi um skaðar, sum tryggingin ikki dekkar. Legg til merkis, at listin ikki er fullfíggjaður. Fullfíggjað yvirlit fært tú í tryggingartreytunum.

- ! Tryggingin fevnir ikki um óarbeiðsføri vegna sjúku fyrr enn 6 mánaðir eftir, at tryggingin er teknað.
- ! Tryggingin fevnir tó um vanlukkutilburð frá tí degi hon er teknað.
- ! Tryggingin fevnir ikki um óarbeiðsføri vegna sjúku, sum longu er, ella sum tekin vóru um, áðrenn tryggingin kom í gildi.

**Betri Trygging P/F**
P/F Kongabrúgvin
Postsmoga 329
FO-110 Tórshavn

Tel. + 298 348 600
betri@trygging.fo
**www.betri.fo**

# Rakstrartap
## *av sjúku ella skaða*

### Tryggingarupphædd

Tryggingin móti rakstrartapi av sjúku ella skaða rindar ta tryggingaupphædd, sum er teknað fyri hvørt einstakt starvsfólk. Útgjaldið veldst um, hvørja upphædd starvsfólkini eru tryggjað fyri – tað kann vera úr kr. 10.000 til kr. 50.000 um mánaðin fyri hvørt tryggjað starvsfólk.

### Hvar dekkar tryggingin?

Fyritøkan skal hava føroyskt v-tal og føroyska adressu.

### Hvørjar skyldur hevur tú?

Tú skalt boða okkum frá skaðanum skjótast gjørligt á tel. 348 600.

Tú skalt boða okkum frá:

- Um fyritøkan flytir ella broytir gjaldsbústað.
- Um vinnugreinin hjá felagnum broytist.
- Um broytingar eru í yvirlitinum yvir tey, ið eru tryggjað og nevnd í tryggingarskjalinum.

### Nær og hvar rindar tú?

Tú kanst gjalda tryggingina árliga, hálvárliga ella hvønn ársfjórðing. Gjaldast kann um sjálvvirkandi gjaldstænastu.

### Tryggingartíðarskeið

Tryggingin er galdandi í eitt ár, um ikki annað er avtalað í tryggingarskjalinum. Hon heldur sjálvvirkandi fram, um hon ikki verður uppsøgd.

### Hvussu sigi eg avtaluna upp?

Tú kanst siga tryggingina upp við 30 daga freist til mánaðarlok.

**Betri Trygging P/F**
P/F Kongabrúgvin
Postsmoga 329
FO-110 Tórshavn

Tel. + 298 348 600
betri@trygging.fo
**www.betri.fo**